# Vilja hitta offur eftir Phoenix-gøluna

**Tveir týskir tíðindamenn vilja hava samband við føroyingar, sum m.a. hava merkt til sviðan av fíggjargøluni í týska felagnum Phoenix**

BLAÐARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Týsku tíðindamenninir Bernd Hauser (hm.), og sum skilir danskt, og Rainer Nübel ivlja hava fatur á føroyingum, sum vita um týskan fótbólt og kenna sviðan av týskari fíggjargølu*

Hvat hava dreingjafótbóltur og gølan um týska íløgufelagið Phoenix við hvørt annað at gera?

Ikki so nógv, halda mong. Men hjá tveimum týskum tíðindamonnum, sum í hesum døgum vitja í Føroyum, hava hesi bæði málini nógv at siga.

Teir arbeiða sum free-lansarar, men hava sett sær fyri at hitta fótbóltshugaðar føroyingar við áhuga fyri týskum fótbólti, eins og føroyingar sum eru raktir av gøluni í týska íløgufelagnum.

Í fyrra førinum er endamálið at skriva fleiri greinar í samband við heimsmeistarakappingina í fótbólti í Týsklandi komandi ár. Í seinna førinum er ætlanin at finna fram til arbeiðsháttin, sum Phoenix hevði fyri at útvega sær kundar í Føroyum, Týsklandi og í mongum øðrum londum.

Teir ætla sær sjálvir at fáa fatur á fólki, men hinvegin so hava fólk eisini møguleika at hitta hesar týsku tíðindamenninar, Bernd Hauser og Rainer Nübel á máli.

Teir komu til Føroyar mikudagin og steðga til sunnudagin. At tosa við teir átti at ligið væl fyri, tí annar teirra, Bernd tosar nevniliga flótandi danskt.

### Fótbóltur á týskum

Tá talan er um heimsmeistarakappingina í fótbólti, so eru týskir fjølmiðlar svangir eftir fótbóltssøgum sum eru tiknar úr øðrum londum.

Hesa svongdina ætla teir báðir sær at vera við til at metta, og eru tí komnir til Føroyar at hitta bæði yngri og eldri føroyingar.

Teir ivast onga løtu í, at nógvir føroyingar vita nógv um týskan fótbólt, - ikki minst eftir at føroyska landsliðið fekk so heiðurlig úrslit móti teimum kendu týsku stjørnunum í 2002 og í 2003.

Ein høvuðsspurningur á hesi ferðini er, um tað eldra fólkið kennir nakrar av týsku stjørnunum frá sjeytiárunum, sum t.d. Franz Beckenbauer, Gerd Müller, Paul Breitner og allar hinar.

Hinvegin so ætla teir sær eisini at fáa prát og myndir frá ungum dreingjum, sum venja fótbólt á ymiskum støðum.

Slíkar søgur eru jú ikki vanligar í týskum, eins væl og í føroyskum fjølmiðlum. Og tí er ikki óhugsandi at teir fáa ymiskar áhugaverdar vinklar á hesar søgurnar.

### Phoenix-gølan rakar mong

Eitt heilt annað mál, og við einum meiri syrgiligum tóna, er fíggjargølan í týska íleggjarafelagnum Phoenix.

Hetta felagið fór so rúkandi á heysin eftir at tað kom fram, at ein stórur partur av teimum 800 mió. EURO snøgt sagt vóru horvnar úr felagnum.

Fleiri føroyingar hava eisini mist nógvan pening orsakað av hesum. Og tað eru hesar, sum týsku blaðmenninir ætla sær at tosa við.

- Tit eru jú eitt lítið samfelag, og tí kann eitt slíkt tap hava stóra ávirkan á nógv fólk, siga teir báðir, Bernd og Rainer.

Teir leggja tó stóran dent á, at alt verður gjørt við dulnevni. Men ynski teirra er at fáa greiðu á, hvussu hetta felagið hevur arbeitt við at fáa føroyskan kapital í felagið.

## Samband á donskum

Teir báðir týsku tíðindamenninir vilja fegnir hava fatur á føroyingum, sum hava merkt sviðan av Phoenix-gøluni.

Teir komu mikudagin og verða her til sunnudagin.

Samband við teir kann fáast við at ringja til Bernd Hauser, sum skilir danskt. Hann hevur eitt týskt nummar - 00491701835226. Tilber at ringja til hann, og síðani kann hann ringja aftur til viðkomandi.

Hava fólk heldur hug at senda teldupost, kann tað gerast á donskum til hauser.bernd@web.de

www.com-data.fo

Com-Data gevur tær møguleikar

KONICA MINOLTA

Business og Service Partner

Konica Minolta hevur eitt breitt úrval av kopimaskinum í øllum støddum til sera kappingarføran prís.



Litkopi og -prentari.

Fleirvirkna maskinan við nógvum møguleikum at:
- litkopiera
- prenta
- skilja
- hefta
- falsa
- gera tín egna faldara



Støkk inn á gólvið og fá meira at vita um stóra úrvalið av kopimaskinum.

VASTI 459010

COM-DATA P/F

Postboks 19 | 700 Klaksvík | Tel. +298 476100
Postboks 204 | 600 Saltangará | Tel. +298 449840



Starvsfólk
TIL BURGER KING Í SMS

**Fulla tíð og aftaná skúlatíð**

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16-25 ár til fulltíðarstarv og at arbeiða aftaná skúlatíð - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

BURGER KING